4. roknskaparár

Skráset. nr. 4627

‘10

# ÁRSFRÁSØGN

Betri pensjón

# PARTAFELAGSUPPLÝSINGAR



## Felagið

Betri Pensjón P/F
Kongabrúgvin
Postboks 329
FO 110 Tórshavn
Tel 345600
betri@betri.fo
www.betri.fo

Skrás. nr. 4627
Roknskaparár 4

## Nevnd

Regin Hammer, nevndarformaður
Jákup Birgir Mohr, næstformaður
Johannes Danielsen
Ingeborg Godtfred
Jan Eiden Müller
Schandorff Vang

## Stjórn

Mortan Poulsen, stjóri

## Grannskoðan

NOTA
Løggilt grannskoðanarvirki P/F

## Ársaðalfundur

Ársaðalfundur verður hildin eftir nærri áseting.



# INNIHALDSYVIRLIT


Partafelagsupplýsingar 2

Leiðslufrágreiðing 4

Nýttur roknskaparháttur 12

5 ára yvirlit 14

Ársfrásøgn 15

Fíggjarstøða 16

Notur 20

Leiðsluátekning 26

Átekning frá óheftum grannskoðarum 27



# LEIÐSLUFRÁGREIÐING

↘ Árið 2010 ↘ Opinleiki og gjøgnumskygni ↘ Fíggjarstøðan ↘ Kapitalstyrki ↘ Stýring av váða ↘ Vitanarstøði ↘ Menning ↘ Etiskar reglur í sambandi við íløgur ↘ Vónir fyri 2011 ↘ Fíggjarútlitini fyri 2011 ↘ Serligar hendingar ↘ Eigaraviðurskifti ↘ Leiðslustørv hjá nevnd og stjórn

# LEIÐSLUFRÁGREIÐING

## ÁRIÐ 2010

Árið 2010 royndist væl hjá Betri Pensjón P/F. Inntøkurnar, sum í fíggjarætlanini vóru mettar til umleið 90 mió. kr., vórðu omanfyri 100 mió. kr. og tann samanspardi peningurin táttaði í 180 mió. kr.

Tað góða rákið á fíggjarmarknaðinum helt fram í 2010. Partabrøvini góvu ein vinning uppá 16,3 %, meðan lánsbrøvini góvu ein vinning uppá 3,3 %, sum eisini má metast at vera sera gott.

**Gongdi í íløgudeildunum**




Úrslitið eftir skatt varð eitt hall uppá 13,1 mió. kr. ímóti einum halli í 2009 uppá 7,2 mió. kr. Samlaði rakstrarkostnaðurin varð uppá 21,4 mió. kr., sum er ein munandi hækking í mun til 2009. Orsøkin er, at felagið í 2010 niðurskrivaði KT- og stovningarútreiðslurnar í einum.

Tryggingargjøldini, íroknað innskot, øktust úr 42,1 mió. kr. til 110,7 mió. kr., og er hetta væl meira enn mett í fíggjarætlanini fyri 2010.

Tilgongdin av nýggjum kundum øktist munandi og vóru við árslok 2.603 persónar skrásettir. 2010 var eisini árið, tá Føroya Lærarafelag valdi at flyta sína eftirlønarskipan til Betri Pensjón P/F, og hevur hetta eisini gjørt sítt til góðu gongdina.

Í 2010 varð eisini gjørd avtala við Suðuroyar Sparikassa um Kjarnutrygging og Restsskuldatrygging.

Kjarnutrygging er nýtt produkt, sum Suðuroyar Sparikassi saman við Betri Pensjón P/F bjóðaðu fram í 2010.

Við Kjarnutrygging tryggjar tryggingartakari, maki ella virkisfelag hvønn annan fíggjarliga, um so er, at annar fellur frá.

### Kjarnutrygging

- Fevnir um alla bankaskuld upp til 1 mió. kr.
- Verður útgoldin skattafrítt uttan um búgvið. Hetta tryggjar mest møguligt til tann, ið eftir situr.
- Kann teknast av øllum, giftum sum ógiftum.
- Kann teknast av teimum, ið eiga eina fyritøku saman.

Ætlanin er, at Kjarnutrygging sum frálíður skal avloysa Restskuldatrygging.

Avtalur eru eisini gjørdar við Skipara- og Navigatørfelagið, Maskinmeistarafelagið og BLF, ið tryggja, at teirra limir kunnu tekna sína pensjón hjá Betri Pensjón P/F.

Pensjónsmarknaðurin í Føroyum er í vøkstri, men enn eru nógv, sum ikki hava eina pensjón ella vita ov lítið um síni pensjónsviðurskifti. Roynt hevur tí verið, við ymiskum átøkum kring landið, at kunna um pensjónsviðurskifti í breiðum høpi. Politiska skipanin hevur boðað frá einum pensjónsreformi. Hesin skuldi eftir ætlanini verða settur í gildi í 2011, men er nú fyribils útsettur til 2012.

Fíggjarinntøkurnar vóru sum nevnt eisini góðar í 2010 og góvu ein vinning uppá 11,4 mió. kr. móti einum vinningi í 2009 upp á 9,7 mió. kr.

Eftir trimum árum nærkast Betri Pensjón P/F einum marknaðarluti uppá 10 %, og hetta verður mett nøktandi.

## OPINLEIKI OG GJØGNUMSKYGNI

Síðani Betri Pensjón P/F byrjaði virksemi, eru vit ofta komin í samband við viðskiftafólk, sum ikki eru greið yvir, hvussu teirra pensjónsviðurskifti eru, ella hvussu teirra pensjónsskipan verður umsitin. Tí hevur stórur dentur verið lagdur á opinleika og gjøgnumskygni. Heimasíðan hjá Betri Pensjón P/F er ment við hesum fyri eyga, og kunnu viðskiftafólk við at knýta seg á skipanina síggja, hvørjar tryggingar tey hava, hvat hesar kosta, hvat tikið verður fyri umsiting, hvussu samansparingin verður rentað o.s.fr. Vit meta, at hetta er ein avgerandi fyritreyt fyri at gera seg galdandi á marknaðinum í dag, og fara vit tí í 2011 at menna hesa skipan uppaftur meira.

## FÍGGJARSTØÐAN

Fíggjarstøðan hjá Betri Pensjón P/F vaks úr 108,6 mió. kr. til 228,2 mió. kr. í 2010. Avsetingarnar fyri Unit Link sáttmálar vuksu úr 67,9 mió. kr. til 177,8 mió. kr. Eginognin var við árslok 2010 38,8 mió. kr. móti 31,8 mió. kr. í 2009.

## KAPITALSTYRKI

Felagið er sterkt í mun til sínar tryggingarligu skyldur, sum sæst av yvirlitinum niðanfyri:

| KR. 1.000 | 2010 | 2009 |
|---|---|---|
| Eginogn | 38.711 | 31.802 |
| Immatriel ogn | -3.540 | -3.383 |
| Skattaáogn | -3 | 0 |
| Grundarfæfeingi | 35.168 | 28.419 |
| Fæfeingiskrav | -24.000 | -24.000 |
| Kapitalstyrki | 11.168 | 4.419 |

Tá felagið var stovnað, varð roknað við halli tey fyrstu árini. Í 2010 varð avgjørt at niðurskriva KT- og stovningarútreiðslur í einum. Orsøkin er, at felagið í 2011 kemur at taka eina nýggja, tillagaða KT skipan í brúk.

Neyðugt hevur tí verið við meira kapitali, og er eginpeningurin øktur við 20 mió. kr. í 2010.

Mett verður, at felagið nú hevur ta neyðugu fíggjarligu styrkina við atliti til lógarkrøvini, ið eru galdandi.

## STÝRING AV VÁÐA

Betri Pensjón P/F metir váða at fevna um øll viðurskifti, ið kunnu hava negativa ávirkan á møguleikar felagsins at røkka síni handilslig mál. Betri Pensjón P/F nýtir væl skipaðar mannagongdir fyri at stýra váðanum. Eisini hevur nevndin ásett umfatandi, yvirskipaðar leiðreglur, sum stjórnin og leiðslan annars alsamt halda eyga við, verða hildnar.

| Fíggjarligir váðar | Tryggingarligir váðar | Operationellir váðar |
|---|---|---|
| Marknaðarváði | Livitið | KT-váðar |
| Gjaldførisváði | Deyðstíttleika | Løgfrøðiligir váðar |
| Mótpartsváði | Avlamnistíttleika | Umsitingarligir váðar |
| Spjaðingarváði | Spjaðing | Svik |
| | | Umdømi |
| | | Strategi |

### Fíggjarligir váðar

Marknaðarváðin er váðin fyri, at dagsvirði á ognum felagsins broytast orsakað av broyttum marknaðarviðurskiftum so sum renta, kursur v.m. Fyri Betri Pensjón P/F er marknaðarváðin nógv tann størsti fíggjarligi váðin. Hesin váði verður avmarkaður við at tryggja hóskandi karmar fyri rentuváða fyri lánsbrøv, saman við eini varisligari íløgustrategi fyri partabrøv.
Eisini verður marknaðarváðin avmarkaður við, at felagið grundar sítt virksemi á Unit Link tryggingar, har kundarnir bera allan íløguváðan. Marknaðarváðin er undir neyvum eftirliti.

Gjaldførisváðin er váðin fyri at staðfesta tap, tí neyðugt er við stuttum skotbrái at útvega gjaldføri fyri at rinda sínar skyldur.
Váðin verður avmarkaður við at hava munandi partar av íløgunum í tøkum peningi og í virðisbrøvum, sum skrásett eru í keypsskálum.

Mótpartsváðin er váðin fyri tapi, tí mótpartar ikki halda sínar skyldur. Mótpartsváðin verður m.a. avmarkaður við at samstarva við íløguumsitarar, sum hava drúgvar royndir og gott orð á sær.

Vantandi spjaðing í íløgum kann hava við sær tap. Spjaðingarváðin verður avmarkaður við at spjaða íløgur felagsins í ymsar vinnur og marknaðir, og við at avmarka íløgur í einstakar ognir (sama útskrivara). Íløgureglurnar fyri partabrøv áseta, at íløgurnar verða spjaddar við atliti til vinnugrein og lond. Somuleiðis fevnir spjaðingarváðin um vanda fyri, at kundar felagsins kunnu missa munandi partar av síni samansparing orsakað av ov lítlari spjaðing í íløgunum. Felagið hevur kundans vegna avmarkað henda váðan fyri flestu produktini við at broyta samansetingina av íløgum, so hvørt sum kundin nærkast eftirlønaraldri.

### Tryggingarligir váðar

Teir tryggingarligu váðanir eru knýttir at gongdini í deyðstíttleika, avlamistíttleika, v.m. Hækkandi livialdur økir veitingar felagsins til eftirlønir, meðan talið av andlátum og sjúkrameldingum ávirkar veitingar í sambandi við deyða og sjúku. Av tí at felagið í høvuðsheitum hevur lagt seg eftir Unit Link tryggingum, har eftirlønin hjá kundanum er knýtt at teirri íløgustrategi, hann sjálvur hevur valt, eru tryggingarligu váðarnir avmarkaðir.

Spjaðingarváði í.s.v. tryggingarligar váðar fevnir um vandan fyri tapi, tá stór samvinna er við einstakar kundabókar og einstakar persónar. Felagið avmarkar tryggingarligu váðarnar við spjaðing av tryggingarmongdini millum ymiskar kundabólkar, við hámørkum fyri ymsum tryggingardekningum og við endurtrygging.

### Operationellir váðar

Felagið kann koma út fyri fíggjarligum tapum vegna operationellan váða, ella hesin kann skaða umdømi felagsins. Operationellir váðar fevna um váða fyri tapi vegna feilir í KT-skipanum, løgfrøðiligum ósemjum, ikki nøktandi ella skeivum mannagongdum ella sviki. Felagið avmarkar operationellan váða við innaneftirliti og funktiónsskilnaði. Hetta verður alsamt endurskoðað og dagført. Harumframt fylgir felagið neyvt við gongdini á marknaðinum fyri at tryggja, at prísir og tænastustøði eru kappingarfør. Stórur dentur verður lagdur á góða kundatænastu umframt opinleika og gjøgnumskygni í samskiftinum við kundan.

## VITANARSTØÐI

Fyri Betri Pensjón P/F er tað av alstórum týdningi, at starvsfólk hava høgt vitanarstøði. Øllum starvsfólkum verður tryggjað viðkomandi útbúgving og eftirútbúgving fyri at økja førleikarnar, so felagsins kundum verður veitt hollasta ráðgeving.

## MENNING

Betri Pensjón P/F leggur stóran dent á at betra um kappingarføri við ørvísi tryggingarproduktum, og tað verður støðugt arbeitt við menning á hesum øki.

## ETISKAR REGLUR Í SAMBANDI VIÐ ÍLØGUR

Betri Penjón P/F setur stór krøv til, hvussu tann samanspardi peningurin verður umsitin, og hvørji etisk krøv verða sett til íløgurnar. Dagført yvirlit yvir, hvørjar fyritøkur eru fevndar av íløguprógvum felagsins, er til skjals á www.sparinvest.dk og www.sparindex.dk.

Í 2011 verður gjørt uppaftur meira við at tryggja, at íløgurnar eru í samsvari við tær etisku meginreglur, sum eru galdandi, og strembað verður eftir at liva upp til standardkrøvini hjá ST (Sameindum Tjóða), feld niður í sonevndu UN PRI avtaluna.

## VÓNIR FYRI 2011

Nógvar broytingar fara fram á fíggjar-

# LEIÐSLUFRÁGREIÐING

Framhald frá síðu 7

marknaðunum í løtuni, sum koma at ávirka gongdina í 2011. Eik Banki Føroyar P/F hevur fingið nýggjar eigarar, og LÍV, ein av teimum stóru veitarunum á pensjónsøkinum, skal seljast.
Kappingin á føroyska marknaðinum er sermerkt av, at vit hava fleiri útlendskar veitarar, ið bjóða seg fram, uttan at tað er møguligt hjá føroysku feløgunum at fara á aðrar marknaðir. Greiða eigur at fáast á hesum sum skjótast, so kappingartreytirnar eru tær somu fyri tey feløg, ið virka á føroyska pensjónsmarknaðinum.

Betri Pensjón P/F fer í 2011 framhaldandi at bjóða seg fram og fer nógv orka at verða løgd í eitt tætt samstarv við fakfeløg. Betri Pensjón P/F er í dag einasta felag, ið gevur sínum viðskiftafólki fult gjøgnumskygni.

Broytingar vórðu framdar í Rentutryggingarlógini í 2010 og verða hesar framhaldandi í gildi í 2011. Rentutryggingarlógin, ið er frá 1971, krevur ábøtur og dagføringar, men nú er ætlanin at leggja hesa lógina saman við pensjónsreforminum, og hetta er eitt stig rætta vegin. Málið má verða at fáa so greiðar og einfaldar reglar sum til ber.

Í 2010 varð hámarkið fyri kapitaleftirløn lækkað til 25.000 kr. ímóti 50.600 kr. í 2009. Lækkingin hevur uttan iva avmarkað inngjaldið í 2010.

Mett verður, at Betri Pensjón P/F eisini í 2011 fer at hava hall.

## FÍGGJARÚTLITINI FYRI 2011

Óvissa er tengd at at gera metingar um fíggjarmarknaðirnar fyri 2011, men vit meta, at betringar eru at hóma í alheimsbúskapinum. At úrslitini hjá virkjum í 2010 tykjast betur enn í 2009, gevur ábending um, at 2011 kann gerast eitt nøktandi partabrævaár. Um búskapargongdin er áhaldandi, veldst um fleiri viðurskiftir, m.a. fallandi arbeiðsloysi, øktari privatnýtslu og íløguhuganum hjá virkjum.
Í 2010 hava fleiri eisini ført fram, at búskapirnir kundu fara at lækka aftur, fyri síðani endaliga at hækka. Grundgevingin er, at búskaparframgongdin hevur verið togað fram av eingangs stimbran, ótta fyri rá- og matvøru inflatión og avleiðingum av stóru skuldarbyrðuni í vesturheiminum. Hesi viðurskifti eru eisini tætt knýtt at vónunum til rentugongdina í 2011.

Tað tykist tó at vera ein ávís semja um, at tann Evropeiska stýringsrentan framhaldandi verður lág í 2011. Betri Pensjón P/F mælir ikki til, at kundarnir taka á seg størri váða enn tíðarskeiðið til eftirlønaraldur og váðafýsni annars tala fyri.

## SERLIGAR HENDINGAR

Frá degnum fyri fíggjarstøðuna til í dag eru ongar týðandi hendingar farnar fram, sum ávirka metingina av ársfrásøgnini.

## EIGARAVIÐURSKIFTI

TF Holding P/F er móðurfelag hjá Betri Pensjón P/F, og eigur allan partapeningin í felagnum.

## LEIÐSLUSTØRV HJÁ NEVND OG STJÓRN

Upplýsingar um onnur leiðslustørv hjá nevnd og stjórn sambært § 129a í Kunngerð um ársfrásagnir hjá tryggingarfeløgum og haldfelagsskapum.

**Nevndarformaður: Regin Hammer**
Stjóri í:
TF Holding P/F og trimum av dótturfeløgum tess.

Eigari av:
RH Sp/f

Nevndarlimur í:
Faroe Insurance Company Guernsey Ltd.
Føroya Fiskiídnaður P/F
Dagsbrún P/F

**Næstformaður: Jákup Birgir Mohr**
Nevndarformaður í:
TF Holding P/F og limur í nevndini í fýra av dótturfeløgunum hjá TF Holding P/F

Nevndarlimur í:
Eik Banki Føroyar P/F
Havsbrún P/F

**Nevndarlimur: Johannes Danielsen**
Stjóri í:
Jóhs Sp/f

Nevndarlimur í:
TF Holding P/F og limur í nevndini í fýra av dótturfeløgunum hjá TF Holding P/F
Borg P/F
Fastognarfelagið KND P/F
KN P/F

**Nevndarlimur: Jan Eiden Müller**
Stjóri í:
Sosialurin Sp/f

Nevndarlimur í:
TF Holding P/F og limur í nevndini í fýra av dótturfeløgunum hjá TF Holding P/F

**Nevndarlimur: Ingeborg Godtfred**
Nevndarlimur í:
TF Holding P/F og limur í nevndini í fýra av dótturfeløgunum hjá TF Holding P/F

**Nevndarlimur: Schandorff Vang**
Nevndarlimur í:
TF Holding P/F og limur í nevndini í fýra av dótturfeløgunum hjá TF Holding P/F





↘ Nýttur roknskaparháttur ↘ 5 ára yvirlit
↘ Ársfrásøgn 1. januar – 31. desember ↘ Fíggjarstøða 31. desember ↘ Notur til ársfrásøgnina
↘ Leiðsluátekning ↘ Átekning frá óheftum grannskoðarum

# NÝTTUR ROKNSKAPARHÁTTUR

## ALMENT

Ársfrásøgnin er gjørd sambært Løgtingslóg um tryggingarvirksemi og er ársfrásøgnin uppsett í samsvari við kunngerð nr. 2 frá 30. desember 2009 um ársfrásagnir hjá tryggingarfeløgum og haldfelagsskapum.

### AVRUNDING AV UPPHÆDDUM

Upphæddir í rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum v.m. verða avrundað til heil tøl uttan desimalir. Av tí at tølini verða avrundað hvørt fyri seg, kunnu avrundingarmunir vera millum upplýstar samanteljingar og summin av teimum undirliggjandi tølunum.

### UM INNROKNAN OG VIRÐISÁSETING Í ÁRSFRÁSØGNINI

Ognir verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt, at felagið fær framtíðar fíggjarligar ágóðar, og virðið á ognunum kann gerast upp álítandi.

Skyldur verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt, at felagið í framtíðini skal av við fíggjarligar ágóðar, og støddin á skyldunum kunnu gerast upp álítandi.

Inntøkur verða innroknaðar í rakstrarroknskapin so hvørt sum tær verða vunnar, harundir virðisjavningar av fíggjarligari ogn og skuld. Í rakstrarroknskapinum verða somuleiðis innroknaðar allar útreiðslur – harundir tryggingarveitingar og broyting í avsetingum – sum er við til at røkka ársins inntøku.

### KONSERNVIÐURSKIFTIR OG NÆRSTANDANDI PARTAR

Handil og tænastur millum feløg í samtakinum verða avgreiddar til marknaðarprís ella á útreiðslunøktandi støði.

### UMROKNING AV ÚTLENDSKUM GJALDOYRA OG KURSTRYGGJAN

Ársfrásøgnin er í donskum krónum. Støðugt verða gjøld í útlendskum gjaldoyra umroknað til danskar krónur við gjaldoyrakursinum á gjaldsdegnum.

Áogn, skuld og aðrir moneterir postar í útlendskum gjaldoyra verða umroknaðar til danskar krónur við gjaldoyrakursinum á degnum fyri fíggjarstøðuni. Staðfestur og ikki staðfestur vinningur ella tap av umrokning av útlendskum gjaldoyra verður innroknað í rakstrarroknskapin undir íløguvirksemi.

## RAKSTRARÚRSLIT 2010

Felagið hevur býtt rakstrarúrslitið fyri 2010 eftir hini sonevndu kontributiónsmeginregluni, sum í stuttum merkir, at tey, ið eru við til at skapa úrslitið, fáa sín lut í hesum.

### RAKSTRARROKNSKAPURIN

Í rakstrarroknskapinum eru tiknar allar inntøkur, so hvørt tær eru innvunnar og allur kostnaður, so hvørt hann er hildin av.

### TRYGGINGARGJØLD

Tryggingargjøld og innskot verða innroknað á skrásettum forfallsdegi.

### ÚRSLIT AV ÍLØGUVIRKSEMI

Rentuinntøkur og vinningsbýti v.m. umfatað ársins rentuinntøkur av innlánum, virðisbrøvum og vinningsbýti av partabrøvum. Virðisjavningar fevna um ársins virðisjavningar av virðisbrøvum.

Tann partur av fyrisitingarkostnaði felagsins, sum hevur beinleiðis tilknýti til íløguvirksemi, verður innroknaður sum fyrisitingarkostnaður av íløguvirksemi.

### TRYGGINGARVEITINGAR

Goldnar veitingar, umframt broyting á avsetingum til endurgjøld frádrigið endurtryggjarans part, verða innroknaðar sum tryggingarveitingar. Eisini verður innroknað afturkeyp av tryggingargjøldum.

### RAKSTRARKOSTNAÐIR AV TRYGGINGARVIRKSEMI

Tann parturin av rakstrarkostnaðinum, ið beinleiðis ella óbeinleiðis kann knýtast at fasthaldan av verandi tryggingum og/ella at nýtekningum, er vístur undir nýtekningarútreiðslum.

Fyrisitingarkostnaður viðvíkur útreiðslum, sum eru nýttar í sambandi við umsiting av verandi tryggingum og av tíðargreinaðum útreiðslum, ið viðvíkja roknskaparárinum.

Fyrisitingargjald til og frá atknýttum fyritøkum verður uppgjørt sum nettoupphædd og mótroknað í fyrisitingarkostnaðinum.

### FLUTT ÚRSLIT AV ÍLØGUVIRKSEMI

Tann partur av úrsliti av íløguvirksemi, sum viðvíkur eginognini, verður innroknaður í henda postin. Tað eru ikki ávísar íløguognir knýttar at eginognini, og tí verður parturin hjá eginognini roknaður út sum ein lutfalsligur partur av samlaða úrslitinum.

### SKATTUR

Skattur av ársúrslitinum, sum fevnir um aktuellan skatt fyri árið umframt broytingar í útsettum skatti, verður innroknaður í rakstrarroknskapin við tí parti, sum viðvíkur ársúrslitinum. Skattur viðvíkjandi møguligum bókingum beinleiðis á eginognina, verður innroknaður á eginognina.

Tann skattur, sum verður førdur í rakstrarroknskapin, verður flokkaður sum ávikavist skattur av vanligum rakstri og skattur av óvanligum upphæddum.

Broyting í útsettum skatti vegna broytt skattaprosent, verður innroknað í rakstrarroknskapin.

Felagið er samskattað við móðurfelagið, TF Holding P/F, sum rindar samanlagda skattin fyri samtakið. Skattaávirkanin av samskattingini verður býtt millum feløgini í samtakinum í mun til skattskyldugu inntøkuna hjá teimum.

Í sambandi við skattliga viðgerð av virðisbrøvum nýtur felagið hitt sonevnda lagurprinsippið, sum m.a. hevur við sær, at allir kursmunir – staðfestir og óstaðfestir – verða taldir við í skattskyldugu inntøkuna.

Í tann mun skattlig hall verða nýtt av øðrum feløgum í samskattingini, verður skattavirðið av hallinum goldið tí felagnum, sum letur hallið frá sær.

## FÍGGJARSTØÐAN

### IMMATERIEL OGN

Immateriel ogn verður innroknað til útveganarprís við frádrátti av samlaðum avskrivingum.
Avskrivingin er eins stór fyri tey einstøku roknskaparárini og er sett út frá væntaðu brúkstíðini, tó í mesta lagi í 20 ár.

**Tey nýttu avskrivingartíðarskeiðini eru:**
Menning av tryggingarproduktum 5 ár

Immateriel støðisogn verður niðurskrivað til endurvinningarvirði, um hetta er lægri enn roknskaparliga virði. Fyri hvørja ogn sær verður árliga mett um tørvur er á niðurskriving.

### MATERIEL STØÐISOGN

Materiel støðisogn verður innroknað til útveganarprís við frádrátti av samlaðum avskrivingum.
Avskrivingin er eins stór fyri tey einstøku roknskaparárini og er sett út frá væntaðu brúkstíðini og mettum restvirði.

Kostprísur er útveganarprísur, umframt kostnaðir, ið beinleiðis eru knýttir at útveganini til dagin, tá ið ognin er klár at taka í nýtslu.

**Tey nýttu avskrivingartíðarskeiðini eru:**
Innbúgv, edv-útgerð, bilar v.m. 3-7 ár

Materiel støðisogn verður niðurskrivað til endurvinningarvirði, um hetta er lægri enn roknskaparliga virði. Fyri hvørja ogn sær verður árliga mett um tørvur er á niðurskriving.

### ÍLØGUOGNIR

Fíggjaramboð verða innroknað í fíggjarstøðuna til keypsprís við frádrátti av keypskostnaði og verða eftir fyrstu innrokning mátað til dagsvirði. Handlaði fíggjaramboð verða tikin við/úr fíggjarstøðuni á avrokningardegnum. Sáttmálavirði av handlaðum, men enn ikki avroknaðum fíggjaramboðum, verða tikin við sum eitt ískoyti ella ein frádráttur til tey tilsvarandi fíggjaramboðini.

Íløguprógv verða innroknað í fíggjarstøðuna saman við teimum undirliggjandi fíggjarognunum.

Dagsvirðið á børsskrásettum fíggjaramboðum verður ásett samsvarandi endakursinum á degnum fyri fíggjarstøðuni.

### ÁOGN

Dagsvirðið fyri áogn verður ásett við atliti at væntaðum tapi.

### AVSETINGAR TIL TRYGGINGAR- OG ÍLØGUAVTALUR

Tryggingartekniskar avsetingar til Unit Link avtalur eru virðisásettar til marknaðarvirði á mótsvarandi virðisbrøvum. Tað er kundin, ið ber allan íløguváðan av Unit Link tryggingum og felagið hevur ikki tikið á seg nakran váða í hesum sambandi.

Avsetingar til endurgjøld fevna um ikki goldnar, men falnar tryggingarveitingar. Í upphæddini er innroknað ein meting av falnum tryggingarveitingum, sum stava frá tryggingarhendingum í roknskaparárinum, men sum ikki eru fráboðaðar við árslok.

### SKULD

Skuld verður innroknað til amortiseraðan kostprís, og hetta svarar vanliga eisini til áljóðandi virði.

### ÚTSETTUR SKATTUR

Útsettur skattur verður roknaður av øllum viðkomandi tíðarbundnum munum millum roknskaparlig og skattlig virðir av aktivum og skyldum.

Útsettur skattur verður innroknaður við støði í teimum skattareglum og skattasatsum, sum eru galdandi á statusdegnum. Útsett skattaáogn, íroknað skattavirði av framfluttum skattligum hallum, verða innroknað til tað virði, ognin kann væntast at kunna avhendast fyri.

### AKTUELLUR SKATTUR

Skyldugur skattur verður innroknaður í fíggjarstøðuna við teirri upphædd, sum kann útroknast av skattskyldugu inntøkuni fyri árið, javnað fyri skatt viðvíkjandi undanfarnum árum.

### LYKLATØL

Hesi eru útroknað sambært ásetingum í kunngerð nr. 2 frá 30. desember 2009 ársfrásagnir hjá tryggingarfeløgum og haldfelagsskapum.

# 5 ÁRA YVIRLIT

| HØVUÐSTØL (KR. 1.000) | 2010 | 2009 |
|---|---|---|
| **RAKSTUR** | | |
| Tryggingargjøld | 110.459 | 41.954 |
| Útgoldnar veitingar | -6.815 | -754 |
| Úrslit av íløguvirksemi | 11.563 | 9.779 |
| Rakstrarkostnaðir av tryggingarvirksemi | -21.406 | -13.581 |
| Úrslit av endurtrygging | -219 | -180 |
| Tryggingartekniskt úrslit | -16.397 | -12.601 |
| Ársúrslit | -13.091 | -7.182 |
| **FÍGGJARSTØÐA** | | |
| Avsetingar til tryggingar- og íløguavtalur tilsamans | 183.292 | 68.344 |
| Eginogn tilsamans | 38.711 | 31.802 |
| Ognir tilsamans | 228.226 | 108.624 |
| **LYKLATØL** | | |
| **Lyklatøl fyri kostnaðir og váðar** | | |
| Kostnaðir í % av tryggingargjøldum | 19,4% | 32,4% |
| Kostnaðir í % av avsetingum | 17,4% | 30,2% |
| Kostnaðir fyri hvønn tryggjaðan | 21.057 kr, | 33.700 kr, |
| Kostnaðarúrslit | -16,4% | -29,4% |
| Váðaúrslit | -7,7% | -3,7% |
| **Lyklatøl fyri konsolidering** | | |
| Ognarkapitalstig | 21,1% | 46,5% |
| Yvirfulnaðarstig | 6,1% | 6,5% |
| Solvensdekningur | 146,5% | 118,4% |
| **Lyklatøl fyri renting** | | |
| Renting av eginogn áðrenn skatt | -63,2% | -42,1% |
| Renting av eginogn eftir skatt | -51,8% | -34,5% |
| Renting av fíggjarognum | 7,2% | 13,2% |

## ÁRSFRÁSØGN 1. JANUAR – 31. DESEMBER

# RAKSTRARROKNSKAPUR

Kr. 1.000

| NOTA | | 2010 | 2009 |
|---|---|---|---|
| | **TRYGGINGARGJØLD FYRI EGNA ROKNING** | | |
| 1 | Bruttotryggingarinntøkur | 110.678 | 42.134 |
| | Endurtryggingargjøld | -219 | -180 |
| | **Tryggingargjøld fyri egna rokning í alt** | **110.459** | **41.954** |
| | **ÍLØGUVIRKSEMI** | | |
| 2 | Rentuinntøkur og vinningsbýti | 2.292 | 1.617 |
| 3 | Kursjavningar | 9.492 | 8.949 |
| | Rentuútreiðslur | -144 | -665 |
| | Fyrisitingarkostnaður í samband við íløguvirksemi | -77 | -122 |
| | **Úrslit av íløguvirksemi í alt** | **11.563** | **9.779** |
| | **TRYGGINGARVEITINGAR** | | |
| 4 | Útgoldnar veitingar | -6.103 | -531 |
| | Broyting í endurgjaldsavsetingum | -712 | -223 |
| | **Tryggingarveitingar fyri egna rokning í alt** | **-6.815** | **-754** |
| | **Broyting í avseting til Unit Link sáttmálar** | **-109.766** | **-46.155** |
| | **RAKSTRARKOSTNAÐUR AV TRYGGINGARVIRKSEMI** | | |
| 5 | Nýtekningarkostnaður | -10.181 | -10.812 |
| 5 | Fyristingarkostnaður | -11.225 | -2.769 |
| | **Rakstrarkostnaður av tryggingarvirksemi fyri egna rokning í alt** | **-21.406** | **-13.581** |
| | **Flutt úrslit av íløguvirksemi** | **-432** | **-3.844** |
| | **Tryggingartekniskt úrslit** | **-16.397** | **-12.601** |
| | **Íløguúrslit av eginognini** | **432** | **3.844** |
| | **ÚRSLIT ÁÐRENN SKATT** | **-15.965** | **-8.757** |
| 6 | **Skattur** | **2.874** | **1.575** |
| | **RAKSTRARÚRSLIT** | **-13.091** | **-7.182** |

FÍGGJARSTØÐA 31. DESEMBER

# FÍGGJARSTØÐA

Kr. 1.000

| NOTA | | 2010 | 2009 |
|---|---|---|---|
| | **OGN** | | |
| 7 | **Immateriel ogn** | **3.540** | **3.383** |
| | **Materiel ogn** | | |
| | Rakstrargøgn | 6 | 7.412 |
| 8 | **Materiel ogn í alt** | **6** | **7.412** |
| | **Aðrar fíggjarligar íløguognir** | | |
| | Íløguprógv | 4.504 | 5.090 |
| | Lánsbrøv | 15.018 | 4.202 |
| | Innlán í kreditfeløgum | 26.787 | 20.284 |
| | **Aðrar fíggjarligar íløgur í alt** | **46.309** | **29.577** |
| 9 | **Íløguognir í alt** | **46.309** | **29.577** |
| 10 | **Íløguognir knýttar at Unit Link sáttmálum** | **177.672** | **67.906** |
| | **Aðrar ognir** | | |
| 6 | Aktuel skattaáogn | 3 | 0 |
| | **Aðrar ognir í alt** | **3** | **0** |
| | **Tíðaravmarkingar** | | |
| | Aðrar tíðaravmarkingar | 697 | 347 |
| | **Tíðaravmarkingar í alt** | **697** | **347** |
| | **OGN Í ALT** | **228.226** | **108.624** |



FÍGGJARSTØÐA 31. DESEMBER

# FÍGGJARSTØÐA

Kr. 1.000

| NOTA | | 2010 | 2009 |
|---|---|---|---|
| | **SKULD** | | |
| | **Eginogn** | | |
| | Partapeningur | 47.500 | 37.500 |
| | Yvirkursur við partabrævaútgávu | 27.500 | 17.500 |
| | Flutt úrslit | -36.289 | -23.198 |
| 11 | **Eginogn í alt** | **38.711** | **31.802** |
| | **Avsetingar til tryggingar- og íløgusáttmálar** | | |
| | Endurgjaldsavsetingar | 1.150 | 438 |
| | Avsett til bonus og avsláttur av tryggingargjøldum | 4.471 | 0 |
| 12 | Avsetingar til Unit Link sáttmálar | 177.672 | 67.906 |
| | **Tryggingartekniskar avsetingar í alt** | **183.292** | **68.344** |
| | **Avsettar skyldur** | | |
| 6 | Avsett til útsettan skatt | 0 | 1.938 |
| | **Avsettar skyldur í alt** | **0** | **1.938** |
| | **Skuld** | | |
| | Skuld í samband við trygging | 1.158 | 136 |
| | Millumrokning við tilknýtt virkir | 1.763 | 3.441 |
| | Annað | 1.097 | 490 |
| | **Skuld í alt** | **4.019** | **4.067** |
| | **Tíðaravmarkingar** | **2.204** | **2.472** |
| | **SKULD Í ALT** | **228.226** | **108.624** |

13 Eventualskyldur og trygdarveitingar
14 Nærstandandi partar
15 Viðkvæmisgreining av fíggjarognum
16 Býti av samlaðum íløguognum á virkisøki og stað



# NOTUR

Kr. 1.000

| NOTA | | 2010 | 2009 |
|---|---|---|---|
| 1 | **Bruttotryggingarinntøkur** | | |
| | Leypandi inngjøld | 43.795 | 13.306 |
| | Eingangsinngjøld | **59.013** | **27.350** |
| | Inntøkur frá samlagstryggingum | 7.870 | 1.479 |
| | | **110.678** | **42.134** |
| | **Herav inngjøld** | | |
| | úr Føroyum | 110.678 | 42.134 |
| | úr EU-londum | 0 | 0 |
| | úr øðrum londum | 0 | 0 |
| | | **110.678** | **42.134** |
| | **Tryggingargjøld frá Unit Link tryggingum** | **110.678** | **42.134** |
| | **Tal av tryggjaðum** | | |
| | Individuelt teknaðar tryggingar | *268* | *93* |
| | Tryggingar teknaðar í samband við starvsetan | *989* | *345* |
| | Samlagstryggingar | *2.300* | *1.082* |
| 2 | **Rentuinntøkur og vinningsbýti** | | |
| | Rentir av virðisbrøvum, innlánum og útlánum | 101 | 122 |
| | Vinningsbýti frá kapitalpørtum | 2.191 | 1.495 |
| | | **2.292** | **1.617** |
| 3 | **Kursjavningar** | | |
| | Partabrøv | 8.979 | 3.075 |
| | Lánsbrøv | 513 | 5.874 |
| | | **9.492** | **8.949** |
| 4 | **Útgoldnar veitingar** | | |
| | Tryggingargjøld við deyða | -599 | -500 |
| | Afturkeyp | -1.034 | -31 |
| | Bonus | -4.471 | 0 |
| | | **-6.103** | **-531** |
| 5 | **Nýtekningar- og fyrisitingarkostnaður fevnur um** | | |
| | **Starvsfólkakostnaður** | | |
| | Lønir | -3.550 | -3.143 |
| | Eftirlønir | -494 | -426 |
| | Aðrir kostnaðir til almannatrygd | -127 | -120 |
| | Lønarhæddaravgjald | -330 | -162 |
| | Aðrir starvsfólkakostnaðir | -69 | -219 |
| | | **-4.570** | **-4.070** |
| | **Herav løn og samsýning til nevnd og stjórn** | | |
| | Nevndarsamsýning | -135 | 0 |
| | Stjórn | -1.035 | -1.009 |
| | **Fulltíðarstørv** | **7** | **5** |

Kr. 1.000

| NOTA | | 2010 | 2009 |
|---|---|---|---|
| 5 | **Samsýning til grannskoðarar** | | |
| | **NOTA, løggilt grannskoðanarvirki P/F** | | |
| | Grannskoðan | -214 | -128 |
| | Aðrar tænastuveitingar | -19 | -69 |
| | **HanSam, skrásett grannskoðaravirki Sp/f** | | |
| | Grannskoðan | -18 | -17 |
| | **Samlaðar útreiðslur til grannskoðarar** | **-251** | **-214** |
| 6 | **Skattur** | | |
| | Úrslit áðrenn skatt | -15.965 | -8.757 |
| | **Skattur 18%** | **2.874** | **1.576** |
| | Aktuellur skattur | 933 | 988 |
| | Broyting í útsettum skatti | 1.940 | 587 |
| | **Skattur sambært ársfrásøgn** | **2.874** | **1.575** |
| | Verandi munir | 0 | 1 |
| | **Avstemma skattaupphædd** | **2.874** | **1.576** |
| | **Skattaáogn** | | |
| | Immateriel ogn | -637 | -609 |
| | Rakstrargøgn | 640 | -1.329 |
| | **Samlað útsett skattaáogn** | **3** | **-1.938** |
| 7 | **Immateriel ogn** | | |
| | Útveganarvirði 1. januar | 6.150 | 6.150 |
| | Frágongd í árinum | 0 | 0 |
| | Tilgongd í árinum | 3.540 | 0 |
| | **Útveganarvirði 31. desember** | **9.690** | **6.150** |
| | Avskrivingar 1. januar | -2.768 | -1.538 |
| | Avskrivingar uppá seldar ognarlutir | 0 | 0 |
| | Avskrivingar í árinum | -1.230 | -1.230 |
| | Niðurskrivingar í árinum | -2.153 | 0 |
| | **Av- og niðurskrivingar 31. desember** | **-6.150** | **-2.768** |
| | **Roknskaparligt virði 31. desember** | **3.540** | **3.383** |
| | **Roknskaparligt virði 1. januar** | **3.383** | **4.613** |
| | **Verður avskrivað yvir** | **5 ár** | **5 ár** |
| 8 | **Materiel ogn** | | |
| | Útveganarvirði 1. januar | 11.975 | 11.975 |
| | Frágongd í árinum | 0 | 0 |
| | Tilgongd í árinum | 0 | 0 |
| | **Útveganarvirði 31. desember** | **11.975** | **11.975** |
| | Avskrivingar 1. januar | -4.563 | -2.520 |
| | Avskrivingar uppá seldar ognarlutir | 0 | 0 |
| | Avskrivingar í árinum | -1.902 | -2.043 |
| | Niðurskrivingar í árinum | -5.504 | 0 |
| | **Av- og niðurskrivingar 31. desember** | **-11.969** | **-4.563** |
| | **Roknskaparligt virði 31. desember** | **6** | **7.412** |
| | **Roknskaparligt virði 1. januar** | **7.412** | **9.455** |
| | **Verður avskrivað yvir** | **3-7 ár** | **3-7 ár** |

Kr. 1.000

| NOTA | | | | 2010 | 2009 |
|---|---|---|---|---|---|
| 9 | **Útgreinan av íløguognum** | | | | |
| | | **Roknskaparligt virði** | | | |
| | | **Ársbyrjan** | **Árslok** | | |
| | Útlendsk partabrøv skrásett á virðisbrævamarknaði | 5.090 | 4.504 | | |
| | **Aðrir kapitalpartar, samlað** | **5.090** | **4.504** | | |
| | Statslánsbrøv | 672 | 3.034 | | |
| | Realkreditlánsbrøv | 3.530 | 11.984 | | |
| | **Lánsbrøv, samlað** | **4.202** | **15.018** | | |
| | | **Netto-íløga** | **Avkast í % áðrenn skatt** | | |
| | Útlendsk partabrøv skrásett á virðisbrævamarknaði | - | 9,2% | | |
| | **Aðrir kapitalpartar, samlað** | **-** | **9,2%** | | |
| | Statslánsbrøv | - | 3,1% | | |
| | Realkreditlánsbrøv | - | 3,1% | | |
| | **Lánsbrøv, samlað** | **-** | **3,1%** | | |
| 10 | **Íløguognir knýttar at Unit Link sáttmálum** | | | | |
| | **Býti av íløguognum uttan trygd** | | | | |
| | Partabrøv | | | 68.113 | 33.401 |
| | Lánsbrøv | | | 109.559 | 34.505 |
| | **Íløguognir tilknýttar Unit Link sáttmálum, samlað** | | | **177.672** | **67.906** |
| 11 | **Eginogn** | | | | |
| | **Partapeningur** | | | | |
| | Partapeningur 1. januar | | | 37.500 | 30.000 |
| | Hækking í árinum | | | 10.000 | 7.500 |
| | | | | **47.500** | **37.500** |
| | **Yvirkursgrunnur** | | | | |
| | Yvirkursgrunnur 1. januar | | | 17.500 | 10.000 |
| | Hækking í árinum | | | 10.000 | 7.500 |
| | | | | **27.500** | **17.500** |
| | **Flutt úrslit** | | | | |
| | Flutt úrslit 1. januar | | | -23.198 | -16.016 |
| | Flutt frá ársúrslitinum | | | -13.091 | -7.182 |
| | Uppskot til vinningsbýti | | | 0 | 0 |
| | | | | **-36.289** | **-23.198** |
| | **Eginogn 31. desember** | | | **38.711** | **31.802** |

Kr. 1.000

| NOTA | | 2010 | 2009 |
|---|---|---|---|
| 11 | **Partapeningur** | | |
| | Partapeningurin hjá felagnum, er eitt partabræv á 47.500 tkr., ið TF Holding P/F eigur. | | |
| | **Grundarfæfeingið og fæfeingiskrav** | | |
| | Eginpeningur | 38.711 | 31.802 |
| | Immateriel ogn | -3.540 | -3.383 |
| | Uppskot til vinningsbýti | 0 | 0 |
| | Útsett skattaáogn | -3 | 0 |
| | **Grundarfæfeingið** | **35.168** | **28.419** |
| | **Fæfeingiskrav** | **24.000** | **24.000** |
| 12 | **Avseting til Unit Link sáttmálar** | | |
| | Avseting primo | 67.906 | 21.751 |
| | Bruttotryggingarinntøkur | 110.678 | 42.134 |
| | Afturkeyp | -1.034 | -31 |
| | Rentir vm. | 10.927 | 6.057 |
| | Tryggingargjøld | 0 | 0 |
| | Umsitingargjald | -1.328 | -360 |
| | Váðaúrslit | -9.477 | -1.645 |
| | **Avseting ultimo** | **177.672** | **67.906** |
| 13 | **Eventualskyldur og trygdarveitingar** | | |
| | Sum trygd fyri tryggingartekniskar avsetingar eru skrásettar ognir uppá | **222.837** | **97.556** |

14 **Nærstandandi partar**

Nevndu feløg hava týðandi ávirkan á Betri Pensjón P/F

| **Navn og Heimstaður** | **Grundarlag fyri ávirkan** |
|---|---|
| TF Holding P/F<br>Kongabrúgvin<br>Postboks 329<br>FO-110 Tórshavn<br>Føroyar | Móðurfelag |

**Samhandil við nærstandandi partar í roknskaparárinum**

| **Navn og Heimstaður** | **Grundarlag fyri ávirkan** | **Samhandil** |
|---|---|---|
| TF Holding P/F | Móðurfelag | Fyrisitingargjald<br>Rentur av millumrokning |
| Tryggingarfelagið Føroyar P/F | Systurfelag | Fyrisitingargjald<br>Rentur av millumrokning |
| TF Ognir P/F | Systurfelag | Leigugjald<br>Rentur av millumrokning |

Kr. 1.000

## NOTA

15 **Viðkvæmisgreining av fíggjarognum**

| **Hending** | **Minsta ávirkan á grundarfæfeingið í tkr.** |
|---|---|
| Rentuhækking uppá 0,7 prosent stig | -482 |
| Rentulækking uppá 0,7 prosent stig | 517 |
| Partabrævalækking á 12 prosent | -556 |
| Ognarprísalækking á 8 prosent | - |
| Valutakursváði (VaR 99,5 prosent) | - |
| Tap uppá mótpartar | - |
| Lækking í deyðatali á 10 prosent | - |
| Hækking í deyðatali á 10 prosent | - |
| Hækking í óarbeiðstali á 10 prosent | - |

**Felagið hevur ikki gjørt avtalu um nakrar samløgubonusskipanir, og tí hava omanfyri nevndu hendingar onga ávirkan á felagið í mun til bonusmøguleikar.**

16 **Býti av samlaðum íløguognum á virkisøki og stað**

| | Føroyar | Evropa annað | Norður Amerika | Suður Amerika | Japan | Fjareystur annað | Onnur lond | Ei sundur-greinað | Í alt |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Orka | 0.0% | 2.4% | 3.0% | 0.0% | 0.6% | 0.0% | 0.0% | 0.0% | 6.0% |
| Atfeingi | 0.0% | 6.6% | 1.3% | 0.0% | 0.8% | 0.0% | 0.0% | 0.0% | 8.7% |
| Ídnaður | 0.0% | 13.9% | 1.4% | 0.0% | 1.7% | 0.5% | 0.0% | 0.0% | 17.4% |
| Nýstluvørur | 0.0% | 3.7% | 4.4% | 0.0% | 0.7% | 0.0% | 0.0% | 0.0% | 8.8% |
| Brúkaravørur | 0.0% | 6.5% | 5.5% | 0.0% | 5.7% | 0.3% | 0.0% | 0.0% | 18.0% |
| Heilsuviðgerð | 0.0% | 7.1% | 3.3% | 0.0% | 1.6% | 0.0% | 0.0% | 0.0% | 12.0% |
| Fígging | 0.0% | 6.4% | 2.4% | 0.0% | 4.9% | 1.2% | 0.0% | 0.0% | 14.9% |
| KT | 0.0% | 1.4% | 4.6% | 0.0% | 2.0% | 0.6% | 0.0% | 0.0% | 8.5% |
| Fjarsamskifti | 0.0% | 1.4% | 0.8% | 0.0% | 1.9% | 0.0% | 0.0% | 0.0% | 4.1% |
| Veiting | 0.0% | 0.6% | 0.7% | 0.0% | 0.2% | 0.0% | 0.0% | 0.0% | 1.6% |
| Ei sundurgreinað | 0.0% | 0.0% | 0.0% | 0.0% | 0.0% | 0.0% | 0.0% | 0.0% | 0.0% |
| **Í alt** | **0.0%** | **49.9%** | **27.4%** | **0.0%** | **20.1%** | **2.6%** | **0.0%** | **0.0%** | **100.0%** |



# LEIÐSLUÁTEKNING

Nevnd og stjórn hava í dag viðgjørt og viðtikið ársfrásøgnina fyri 2010 hjá Betri Pensjón P/F.

Ársfrásøgnin er greidd úr hondum í samsvari við lóg um tryggingarvirksemi.

Vit meta, at nýttu roknskaparreglurnar eru hóskandi, soleiðis at ársfrásøgnin gevur eina rættvísandi mynd av ognum og skyldum felagsins, fíggjarligu støðuni pr. 31. desember 2010, umframt av úrslitinum av virksemi felagsins fyri roknskaparárið 1. januar 2010 - 31. desember 2010.

**BETRI PENSJÓN P/F**
Tórshavn, hin 3. mars 2011

**STJÓRN**
Mortan Poulsen, stjóri

**NEVND**
Regin Hammer, formaður
Jákup Birgir Mohr, næstformaður

Jóhannus Danielsen · Ingeborg Godtfred
Jan Eiden Müller · Schandorff Vang



# ÁTEKNING FRÁ ÓHEFTUM GRANNSKOÐARUM

## TIL PARTAEIGARARNAR Í BETRI PENSJÓN P/F

Vit hava grannskoðað ársfrásøgnina hjá Betri Pensjón P/F fyri roknskaparárið 2010, við leiðsluátekning, leiðslufrágreiðing, nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu, frágreiðing um eginogn, og notum fyri felagið. Ársfrásøgnin er gjørd eftir lóg um tryggingarvirksemi.

### ÁBYRGD LEIÐSLUNNAR AV ÁRSFRÁSØGNINI

Leiðslan hevur ábyrgd av at gera eina ársfrásøgn, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við lóg um tryggingarvirksemi. Henda ábyrgd ber í sær, at felagið støðugt hevur tað innanhýsis eftirlit, ið skal til fyri at ársfrásøgn kann gerast, sum gevur eina rættvísandi mynd uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, at nýttur verður hóskandi roknskaparháttur, og at roknskaparligu metingarnar, sum gjørdar eru, eftir umstøðunum mugu ætlast at vera rímiligar.

### GRANNSKOÐANIN OG ÁBYRGD GRANNSKOÐARANS

Okkara ábyrgd er við støði í grannskoðanini at gera eina niðurstøðu um ársfrásøgnina. Vit hava grannskoðað samsvarandi galdandi føroyskum grannskoðanarreglum, ið krevja, at vit halda tey etisku krøvini og leggja til rættis og grannskoða fyri at fáa grundaða vissu fyri, at tað ikki eru týðandi skeivleikar í ársfrásøgnini.

Grannskoðanin ber í sær, at gjørt verður tað arbeiði, sum skal til fyri at fáa grannskoðanarprógv fyri upphæddum og upplýsingum í ársfrásøgnini. Grannskoðarin metir um, hvat arbeiði skal gerast, harundir metir hann um vandan fyri týðandi skeivleikum í ársfrásøgnini, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum. Grannskoðarin metir eisini um innanhýsis eftirlitið, ið skal til fyri at felagið kann gera eina ársfrásøgn, sum gevur eina rættvísandi mynd. Hetta verður gjørt fyri at leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum og ikki fyri at gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum. Grannskoðanin ber eisini í sær, at støða verður tikin til, um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, um tær roknskaparligu metingarnar, sum leiðslan hevur gjørt eru rímiligar, og hvussu ársfrásøgnin sum heild er gjørd.

Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kann vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

### NIÐURSTØÐA

Tað er okkara fatan, at ársfrásøgnin gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ognum, skyldum og fíggjarligu støðu 31. desember 2010 og av úrslitinum av virksemi felagsins í roknskaparárinum 2010 samsvarandi lóg um tryggingarvirksemi.

Tórshavn, hin 3. mars 2011

NOTA

**Løggilt grannskoðanarvirki P/F**

*Hans Laksá*
*Løggildur grannskoðari*

*Joen Magnus Lamhauge*
*Skrásettur grannskoðari*

Betri pensjón

Kongabrúgvin
Postboks 329
FO-110 Tórshavn
Tel 345600
www.betri.fo